### Væntaði ikki at síggja prinsin aftur

Komandi danska krúnprinsessan Mary Donaldson ímyndaði sær ikki, at hon skuldi flyta hálvan teinin kring knøttin, tá ið hon fyrstu ferð hitti Fríðrik Krúnprins undir olympisku leikunum í Sydney.

– Tá ið Fríðrikur fór heim, roknaði eg ikki við, at eg fór at síggja hann aftur, og eg var kedd um, at hann ikki var úr Australia, sigur Mary Donaldson í samrøðu við Danmarks Radio. Men gjøgnum telefonsamrøður, teldubrøv og brøv eydnaðist tað teimum at halda sambandið við líka.

Mary Donaldson sigur eisini í samrøðuni við Danmarks Radio, har danski krúnprinsurin fyrst spurdi pápa hennara, um hann kundi gifta seg við henni.

**-ek**

### Saddam Hussein var særdur av bumbum

Fyrrverandi forsetin í Irak, Saddam Hussein, varð longu í 1991 særdur í einum amerikanskum bumbuálopi. Hetta er komið fram, eftir at læknin hjá Hussein hevur tosað við ein arabiska avís. Saddam Hussein sjálvur situr eisini í amerikanskum varðhaldi í Irak, men fyri 13 árum síðani var tað um reppið, at amerikumenn gjørdu av við hann.

Læknin Ala Bashir sigur, at hann varð í skundi boðsendur at koma á eitt sjúkrahús, sum var ætlað irakiskum leiðarum, og har lá Saddam Hussein á operatiónsborðinum. Hann bløddi illa, og læknin helt, at hann var deyður. Men tað var hann ikki, og hann varð skurðviðgjørdur í vinstru síðu av andlitinum og í øðrum lítlafingri, og hann kom seg. Tá varð sagt, at irakiski leiðarin hevði fingið skaða í einum bilóhappi, men læknin var ikki í iva um, at hann var særdur í einum bumbuálopi.

**-ek**

### Ísland hevur besta kappingarførið

Ísland er tað landið í Europa, sum hevur besta kappingarføri. Tað kemur fram í bókini The World Competitiveness Yearbook for 2004, sum verður gjørd av IMD-instituttinum í Sveis.

Øll tey norðurlendsku londini verða mett at hava gott kappingarføri og liggja frammanfyri tey stóru ES-londini Týskland, Frakland, Italia, Spania og Stórabretland.

Og ovast av øllum er so Ísland, sambært hesi uppgerðini.

**-ek**

### Forelskilsi ger menn og kvinnur eins

Tá fólk gerast forelskaði, kemur rumbul í hormonini. Tað ger, at nýforelskað pør gerast meira lík hvørjum øðrum.

Ein italiensk kanning vísir, at testosteronstøði hjá bæði kvinnum og monnum broytist í mun til tað vanliga, tá tey gerast forelskað.

Forelskaðir menn høvdu eitt lægri støði av hormoninum, testosteron, sum stýrir aggresjónini og kynshuginum. Harafturímóti høvdu kvinnur eitt hægri støði av testosteron í kroppinum, enn samsystrarnar, ið ikki vóru forelskaðar.

Hetta uppdagaði granskarin, Donatella Marazziti, tá hon kannaði 24 forelskað pør.

- Tað sær út til, at náttúran roynir at beina burtur størstu munirnar millum kvinnur og menn, sigur hon.

Men, tá somu pør tvey ár seinni - eftir at ástarrúsurin var av - vórðu kannaði, var testosteronstøðið aftur við tað gamla.

Og hvør veit, kanska er einasta vón fyri javnstøðu eitt ævigt forelskilsi...

**r.s.**

*Kelda: Nettavisen*

## VIÐMERKINGAR

## Gransking og hægri útbúgving
# HØG MÁL - SKERD JÁTTAN

**Fróðskaparsetur Føroya Setursráðið**

Skulu Føroyar verða tiknar fyri fult í altjóða vísindaligum høpi, má játtanin til gransking, menning og hægri útbúgvingar økjast heldur enn skerjast. Hetta er somuleiðis ein fortreyt fyri at menna samstarvið millum Fróðskaparsetrið og vinnulívið. Tað tekur tíð at byggja upp, men skjótt er at bróta niður.

Í nútíðarsamfeløgum eru gransking og hægri útbúgvingum hornasteinar í samfelagsligum framburði. Altjóðafelagsskapurin OECD (Organisation for Economic Co-operation and Development) hevur tí sett sær sum mál, at limir tess í 2010 skulu seta 3 % av bruttotjóðarúrtøkuni í gransking og menning. Norðurlond seta í meðal longu 3-4 % av. Í Føroyum eru hagtøl ikki tøk, men metingar benda á, at talið fyri Føroyar er umleið 0.5 %.

**Politiski málsetningurin?**
Í valstríðnum upp undir valið herfyri løgdu allir flokkar dent á, at gransking hevur stóran týdning fyri menning og framburð í føroyska samfelagnum. Hetta sást tó ikki aftur, tá nýskipaða samgongan legði fram uppskot til fíggjarlóg fyri 2004. Játtanin til gransking v arð skerd munandi. Fíggjarnevndin hevur nú skert fíggjar-lógaruppskotið enn meira á hesum øki. Hetta afturstig bendir á, at politiski málsetningurin ikki er at nærkast grannalondum, tá ræður um íløgur í gransking, menning og hægri útbúgvingar. Tey høgu granskingarligu mál, sum landsstýrið setti sær í samgonguskjalinum, síggjast ikki aftur í fíggjarlógaruppskotinum.

Umleið 350 ung fólk fáa hvørt ár eitt miðnámsskúlaprógv. Av teimum fara nógv burtur at lesa og í miðal fara eini 30 hvørt ár undir lestur á Fróðskaparsetrinum. Málið hjá Fróðskaparsetrinum er at bjóða út fleiri útbúgvingar, soleiðis at ungdómurin kann fáa sær førleikar og samfelagið fáa meira høgt útbúna arbeiðsmegi at grunda nýggjar vinnur.

**Eitt føroyskt universitet?**
Eitt av politisku málunum í samgonguskjalinum er menna hægri útbúgvingarmøguleikar í Føroyum. Undir yvirskriftini *Hægri lestur* stendur, at "Fróðskaparsetrið skal hava hóskandi umstøður og hava møguleikar at geva fleiri útbúgvingartilboð." Tí undrar tað stórliga at júst játtanin til Fróðskapar-setrið er skerd munandi. Fróðskaparsetrið fær verri umstøður og verður noytt at minka um lestrartilboðini.

Fróðskaparsetrið er ein av stovnunum, har skerjingarnar á fíggjarlógini eru ógvusligar. Í verandi uppskotinum er játtanin skerd við umleið 10 % í mun til í 2003. Í uppskotinum frá mars var játtanin skerd við 800 tús. krónur, og í uppskotinum frá mai er játtanin lækkað við 1 millión krónum aftrat. Á hesum grundarlagi er trupult at tosa um, at Føroyar hava ella virka fyri at menna eitt føroyskt universitet.

**Fróðskaparsetrið og vinnulívið**
Fróðskaparsetur Føroya er tann stovnur í landinum, har flestir granskarar eru savnaðir. Teir eru býttir millum náttúruvísindi, tøkni og hug- og samfelagsvísindi. Í ljósinum frá orðaskiftinum um týdningin av gransking og minkandi og spjaddu játtanirnar til hennara er vert at geva gætur, at tað serliga eru tøknifrøði og náttúruvísindi, sum hava vinnuligan áhuga. Hesi øki eru ment so mikið seinnu árini á Fróðskaparsetrinum, at stovnurin kann bjóða seg fram sum samstarvspartur við vinnulívið. Fróðskaparsetrið ynskir at menna vinnuligar samstarvsmøguleikar, t.d. við KT-vinnuna og biotøkniligu vinnuna, men fortreyt fyri tí er eyðsæð, at myndugleikarnir játta vísindastørv til hesi evnisøki á Fróðskaparsetrinum. Harvið hevði borið til at givið ungdómi okkara hægri útbúgving á hesum økjum, og tey høvdu við síni útbúgving sum grundarlag kunna ment vinnulívið enn meira. Hetta hevði verið í samsvari við tað, ið verður sagt um vinnupolitikk í samgonguskjalinum. Har stendur, at "fortreytir fyri vøkstri verða millum annað skaptar gjøgnum gransking og menning, t.d. innan KT, gen- og biotøkni."

**Samanumtikið**
Fróðskaparsetrið vil heita á tingfólk um at líta aftur at málsetningunum í samgonguskjalinum og økja játtanina aftur til Fróðskaparsetrið. Á einum universiteti verður vitan framleidd við gransking. Undir útbúgvingini heysta tey ungu fruktirnar av granskingini gjøgnum undirvísingina. Gransking og hægri útbúgvingar eru íløgur í framtíðina.

# Hvat er munurin á, at útlendingar arbeiða í Føroyum og føroyingar uttanlands?

**Tórstein Christiansen**

Seinastu nógvu vikurnar hevur nógv verið skrivað um teilendingar, ið eru í Skálavík og arbeiða. Teir skulu bæði taka arbeiðsmegi frá føroyingum og tað, ið eg ikki ætli at koma inn á, líða neyð. Verður søgan vend á høvdið og hugsað um okkum føroyingar, sum í langa tíð hava havt dagligu arbeiðsgongdina uttanlands, er tað so ikki eitt sindur ov nógv gjørt av, at skula senda útlendingar avaftur landinum? Eg trúgvi tað hevði verið minst líka nógv skrivað, um tað vóru føroyingar, ið blivu útvístir úr eitt nú ES og EØS londum, hóast her eru greiðar avtalur í lagi. Hví fara vit føroyingar út í heimin at arbeiða? Tað er ikki tí lønin er verri, umstøðurnar at arbeiða undir eru verri ella ikki at vera væl móttikin av samfelagnum har. Heldur tvørturímóti.

**Noreg**
Sjálvur havi eg verið 2 summarsesongir í Noregi og arbeitt. Eg arbeiddi á einum hotelli saman við 50-80 øðrum útlendingum. Nevnast kann, at tað ikki vóru fleiri enn 10 norðmenn, ið arbeiddu á hotellinum. Sum søgan ljóðaði har, vóru norðmenn ikki nóg effektivir, gjørdu alt fyri at fáa eina undirskrift frá arbeiðsgevaranum, so tey kundu brúka ta sosialu skipanina úr einum enda í annan. Vit tóku ikki arbeiðsmegi frá norðmonnum heldur, tí har vit arbeiddu, høvdu tey undir ongum umstøðum kunnað fingið mannað hotellið bert við norðmonnum. Vit høvdu góð og greið viðurskifti at arbeiða undir, so sum løn, skattur, tryggingar og frítíð. Vit fingu ikki minni í løn enn norðmenn, men harafturímóti goldu vit minni í skatti. Nevnast kann eisini, at lønarskipanin ikki er heilt tann sama sum her, men hon er heldur til okkara fyrimun. Í síðsta enda var tað upp til okkum sjálvi, hvussu væl vit kundu liva undir teimum norsku lógunum og rættindunum. Hetta er eitt norðurlendskt land, men føroyingar høvdu ikki havt nógv verri kor at arbeitt undir, um tað var í øðrum londum.

Hvør vinnur so mest?

Tað er bæði til fyrimun hjá tí fremmanda arbeiðaranum og hjá tí respektiva samfelagnum at hava útlendingar í arbeiði. Útlendingurin vinnur meiri, enn hann hevði gjørt heima, og samfelagið fær ágóðan av skattinum. Samfelagið fær ikki bert ágóðan av skattinum, men eisini av tí livikostnaði útlendingurin krevur, so sum innkeypi, flutningi osfr. Hinvegin sleppur samfelgið í nógvum førum frá nógvum sosialum veitingum, ið krevjast av útlendinginum. Her verður mest hugsað um barnagarðsplássi, skúla og uppihaldspeningi. Á teimum smáu plássunum skal heldur ikki so nógv til at fáa hjólið at mæla betur runt.

**Vansin við at senda teilendingarnar avstað**
Verða teilendingarnir sendir avstað, so missir Skálavík eitt virkið, ið hýsir nógvum arbeiðsplássum. Tað eru ikki nóg nógv fólk at taka av at manna virkið bert við føroyingum. Teilendingarnir hava lagt grundarlag fyri, at tað hava verið nóg nógv fólk at manna virkið. Teir taka ikki arbeiða frá fólki, heldur hinvegin geva arbeiði, tí verða teir ikki her, so verður heldur einki arbeiðspláss til føroyingarnar, ið knýttir eru at virkinum.

Nú er tað so bara upp til myndugleikarnar at avgera, hvussu langa teirra teilendsku verður. Hevði verið hugsað hinvegin, so trúgvi eg ikki, at myndugleikarnir vildu gjørt líka nógv við at fáa allar teir fleiri túsund føroyingarnar heimaftur at arbeiða, sum eru uttanlands. Miðstaðarøkið er við at vera fult. Útjaðarin er alt ov veruleikafjarður at koma aftur til. Men er tað ikki akkurát har, ið teilendingarnir eru og stuðla undir menningini og virkseminum har?



## UTTAN ÚR HEIMI

# Hermenn fingu skeið í píning

**Amerikanarar og bretar leitaðu sær ráð hjá ísraelsmonnum fyri at læra, hvussu muslimskir fangar skulu mýkjast**

PÍNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bretskir fjølmiðlar vilja vera við, at ísraelsmenn hava lært amerikanarar og bretar, hvussu teir skulu fara við irakskum fangum fyri at "fáa teir á glið". Sambært fjølmiðlunum kærdu teir amerikonsku og bretsku hermenninir seg um, at teir fingu ov lítið at vita frá teimum iraksku fangunum, og at teir tí leitaðu sær góð ráð úr Ísrael, har myndugleikarnir hava drúgvar royndir í at avhoyra palestinar og aðrar muslimar.

Ein bretskur heryvirmaður segði við blaðið The Guardian sunnudagin, at teir bretsku fangavørðarnir í Irak fingu boð um at mýkja teir iraksku fangarnar, so teir skuldu verða betri at fáast við, tá CIA ella bretska fregnartænastan, MI6, skuldi avhoyra teir. Sambært heryvirmanninum høvdu hermenninir fingið útbúgvingina á skeiðum á einari herstøð í Kent, men seinni varð útbúgvingin flutt til eina fyrrverandi amerikanska herstøð í Bretlandi, sigur hann.



*Amerikanski hermaðurin Charles Graner kann koma fyri ein krígsrætt, tí hann er skuldsettur fyri at hava farið illa við irakskum fangum. Men avvarandi hjá teimum skuldsettu hermonnunum vilja vera við, at teir eru syndabukkar, og at teir gjørdu bara tað, sum teir fingu boð um*

*Mynd: Reuters*

Sum dømi um píning nevnir heryvirmaðurin, at teir iraksku fangarnir fingu ein posa smoygdan niður yvir høvdið, teir sluppu ikki at sova og vórðu hóttir alla tíðina. Hann sigur, at bretski herurin hevur eitt yvirlit yvir, hvussu muslimskir fangar skulu mýkjast. Sum dømi nevnir hann, at fangarnir ofta ganga naknir, og at teir verða noyddir til ymiskt kynsligt virksemi, meðan kvinnuligir hermenn standa og hyggja at teimum.

**Nógv afturat**
Samstundis stúra amerikanarar og bretar fyri, at fleiri avdúkandi myndir og sjónbond fara at avdúka, hvussu amerikanskir og bretskir hermenn fara við teimum iraksku fangunum.

– Vit kunnu vænta at síggja nógv afturat - eisini tað, sum er uppaftur verri enn tað, sum vit longu hava sæð, segði amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, leygardagin.

Samstundis harðar trýstið á teir ráðandi, tí fleiri av teimum skuldsettu amerikonsku hermonnunum vilja vera við, at teir fingu boð um at pína fangarnar. Boðini komu frá teirri hernaðarligu fregnartænastuni, siga teir.

# Óvissa um Thule-málið

**Verður Thule-málið ikki lagt fyri evropeiska mannarættindadómstólin innan 29. mai, fer tað í søguna**

THULE-MÁLIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Felagsskapurin hjá Thule-fólkinum, Hingitaq 53, ætlar sær at leggja tað sonevnda Thule-málið fyri tann evropeiska mannarættindadómstólin. Tað ætlar sakførarin hjá felagnum, Christian Harlang, eisini.

Thule-fólkini taptu málið í danska Hægstarætti, men Hans Enoksen, landsstýrisformaður, hevur sagt, at landsstýrið er sinnað at útvega Hingitaq 53 pening til at leggja málið fyri mannarættindadómstólin í Strasbourg. Enn hevur landsstýrið ikki játtað peningin, og nú hevur tað skund. Christian Harlang sigur við grønlendska útvarpið, at skal mannarættindadómstólurin viðgera málið, skal tað lætast dómstólinum í seinasta lagi tann 28. mai. Annars fer Thule-málið í søguna, sigur hann.

Í Strasbourg ætlar sakførarin at leggja dent á tann partin av úrskurðinum hjá Hæøgstarætti, sum sigur, at teir donsku myndugleikarnir høvdu rætt til at geva grønlendingum øðrvísi viðferð enn dønum.

– Hendan munin vilja vit ikki góðtaka, og hann skal mannarættindadómstólurin taka støðu til, sigur Christian Harlang við KNR.

### Verður hevnt

Í Russlandi hevur Vladimir Putin, forseti, gjørt greitt, at teir russisku myndugleikarnir fara at hevna morðið á kekenska forsetan, Akhmed Kadyrov, sum doyði í einari bumbuatsókn í Grosny sunnudagin.

Russisku myndugleikarnir ivast ikki í, at tað vóru kekenskir uppreistrarmenn, sum løgdu bumbuna. Bumban brast á ítróttarvøllinum í Grosny, har fólk vóru komin saman at minnast sigurin á Týsklandi undir seinna heimsbardaga. Sjálvur var Putin á einum tilsvarandi hátíðarhaldi í Moskva, og hann var ikki seinur at lova hevnd, tá hann frætti um tilburðin í Kekenia:

– Eingin skal vera í iva um, at vit fara at hevna tað, sum er hent. Yvirgangsmenninir skulu vita, at teir sleppa ikki undan hevnd okkara, segði russiski forsetin. Um tann myrda Akhmed Kadyrov segði Putin, at hann hevði víst, at munur er á brotsmonnum, yvirgangsmonnum og tí kekenska fólkinum.

### Læra av Madrid

Bjargingarmyndugleikarnir í Danmark hava sett sær fyri at taka við læru av tí, sum teir sponsku myndugleikarnir lærdu av teirri blóðugu atsókníni í Madrid fyri tveimum mánaðum síðani, ið kravdu umleið 200 mannalív.

Skrivstovustjórin hjá donsku tilbúgvingarleiðsluni, Jørn Devantier, sigur við Jyllandspostin, at sjálvandi er tað umráðandi hjá teimum donsku myndugleikunum at læra sum mest av tí, sum hendir aðrastaðni. Í fyrsta umfari er ætlanin, at ES skal kanna, hvussu teir sponsku myndugleikarnir samskipaðu bjargingararbeiðið aftan á atsóknina, og ætlanin er so, at hini limalondini skulu fáa niðurstøðuna og taka við læru av henni.

Jørn Devantier sigur, at hevur niðurstøðan ikki nóg mikið at siga dønum, fer danska tilbúgvingin at gera sína egnu kanning av tí, sum hendi í Madrid. Bjargingararbeiðið har var sera umfatandi, tí umframt tey 200, sum doyðu, fingu meiri enn 1.000 fólk skaða av bumbunum.

### 20 skulu verja Saddam

Fyrrverandi irakski leiðarin, Saddam Hussein, verður ikki einsamallur við ákærubonkin, tá rættarmálið ímóti honum kemur fyri einaferð.

Kona Saddam, Sajida, og tær tríggjar døturnar hava útvegað gamla leiðaranum tjúgu verjar. Tað sigur jordanski sakførarin Mohammad Al-Rachdane, sum sjálvur verður ein av verjunum. Næstan allir verjarnir eru arabar, men í hópinum eru eisini ein amerikanari, ein fransmaður og ein sveitsisku sakførari.

Tað hevur leingi ljóðað, at tann kendi franski sakførarin Jacques Verges skal verja Saddam Hussein, men hann er ikki ímillum teir tjúgu, sum nú verða nevndir. Jacques Verges hevur verið verji hjá yvirgangsmanninum "Carlos", nazistaleiðaranum Klaus Barbie og fyrrverandi jugoslaviska forsetanum Slobodan Milosevic. Hann hevði eisini boðað frá, at hann var til reiðar at verja Saddam Hussein.

### Rátt skúlamál

Danskir skúlanæmingar eru farnir at nýta eitt so rátt mál innan og uttan skúlagátt, at lærararnir eiga at gera okkurt við tað. Tað heldur Niels Egelund, sum er professari á Danmarks Pædagogiske Universitet.

Hann heldur, at lærararnir lata alt ov nógv um seg ganga, tá tað snýr seg um málbrúkið hjá skúlanæmingunum. Orð sum "fuck dig", "luder" og "perker" eru vorðin vanlig í skúlagarðinum og aðrastaðni, og tað hvørki eigur ella kann skúlaverkið góðtaka, sigur Niels Egelund. Hann heldur, at lærararnir eiga at gera av, hvørji orð skúlin kann góðtaka, og at teir tosa við næmingarnar og foreldrini um tað.

Formaðurin í danska foreldrafelagnum, Thomas Damkjær Petersen, er samdur við professaranum. Hann sigur við Jyllandspostin, at málið hjá nógvum skúlabørnum er komið niður á eitt so lágt støðið, at hann ivast í, at børnini yvirhøvur vita, hvat tey siga. Hann ásannar, at tað er kanska ikki uppgávan hjá foreldrunum at læra børnini, hvat tey kunnu siga í skúlanum, men hann heldur kortini, at foreldrini eiga at gera sítt og at arbeiða saman við lærarunum fyri at gera børnunum greitt, at slíkt orðalag verður ikki góðtikið.